# Endiliga eydnaðist tað hjá VB

*Endiliga hevði VB smáu marginalarnar við sær, og tískil verða steypafinalurnar ikki bert ein spurningur, sum havnarfeløgini skulu svara*

JÁKUP MØRK

VB-Neistin 19-16 (11-6)

Setningurin hjá Vágsgentum var púra greiður undan dystinum sunnudagin. Neistin hevði vunnið fyrru hálvfinaluna millum liðini bæði, og tá mátti hesin dysturin vinnast, um VB skuldi tryggja sær finalusessin.

Hetta var triðja vikuskifti í slag, at liðini bæði hittust, og hóast Neistin hevði munin í teimum báðum undanfarnu dystunum, so hevði talan verið um tveir javnar og spennandi dystir, so Vágsgenturnar høvdu als ikki mist vónina um at basa neistagentunum.

Kanska hevði tað eisini nakað at siga, at hetta helst var seinasta møguleiki hjá VB at tryggja sær heiðursmerki av nøkrum slag.

Í landskappingini hava tær verið partur í fleiri sera jøvnum dystum, men so at siga hvørja ferð hava tær verið við undirlutan, og tað hevur so borið við sær, at gloppið upp til hini liðini er vorðið ov stórt.

**Løgdu nógv fyri**

Tá dysturin byrjaði, legði heimliðið fyri sum eitt óløgið. Fyrstu 20 minuttirnar fekk útiliðið bert eitt mál, og líkt var til, at talan skuldi gerast um ein rættuligan bank.

Dennis Holm, liðleiðari hjá VB, segði eftir dystin, at tað serliga var í verjupartinum, at grundarlagið fyri sigrinum varð lagt. Tað eydnaðist leikarunum sera væl at taka vengurnar hjá Neistanum úr spælinum, so alt meir ella minni varð trunkað saman á miðjuni.

Neistin kom tó nakað við aftur seinasta partin av hálvleikinum, men við eini fimm máls leiðslu í hálvleikinum, mundu flestu viðhaldsfólkini halda, at nú stóð væl til.

**Góvu ikki upp**

Neistakvinnurnar góvu tó ongantíð skarvin yvir, og í seinna hálvleiki royndu tær at stríða seg inn aftur á VB liðið.

Hetta var eisini nær við at eydnast, og so hvørt sum neistakvinnurnar komu nærri, gjørdust VB leikararnir alt meira fjálturstungnar.

Nærri enn 13-15 komu havnargenturnar tó ongantíð, og brádliga fekk VB aftur spælið at koyra. Tvey máls leiðslan varð varveitt restina av dystinum, og sjálvsagt var frøin stór, tá dómaraparið blásti dystin av.

**Hava hagtølini við sær**

Sum vera man, so vóru VB genturnar ovurfegnar, tá dysturin var liðugur. Sigurin og finaluplássið hava við sær, at tær í hvussu so er fáa okkurt slag av metallið burtur úr kappingarárinum.

Ikki minst sálarliga man tað kennist sum ein lætti, nú tær endiliga vunnu ein teimum mongu jøvnu dystunum, sum tær hava verið partur av í kappingarárinum.

Bæði móti Kyndli, VÍF og Neistanum hava dystir teirra verið sera javnir, men ongantíð hevur tað eydnast teimum at fáa bæði stigini við til hús.

Neistaliðið má sostatt annað árið á rað hyggja at, tá steypafinalurnar verða avgreiddar, og hetta er als ikki nakað, sum tær eru vanar við.

VB skal hin vegin leika finaluna komandi leygardag. Hvussu tann dysturin fer at enda er sjálvsagt ilt at siga, men mótstøðuliðið í tí dystinum, Kyndil, tykist vera sera væl fyri í løtuni. VB hevur tó hagtølini við sær, tí seinast tær vóru í finaluni, í 1993, fingu tær steypið við sær suður, meðan Kyndil hinvegin ikki hevur fingið so nógv burtur úr teimum fimm finaludystunum, sum tær hava leikt í nítiárunum.



*Fimtu ferð VB og Neistin hittust í ár, eydnaðist tað vágsgentunum at vinna, og nú kunnu tær fyrireika seg til finaludystin komandi leygardag*

**Dysturin í tølum**

**Málskjúttar:**
VB: Regina Rádó 8, Rannvá Augustinussen 4, Sólrun Krosslá 3 (2), Gurið Mortensen 1, Arnleyð Krosslá 1, Kristina Holm 1
Neistin: Katrin á Neystabø 5 (3), Ileana Manolescu 4, Birita Wardum 3, Mildrid Jacobsen 2, Marjun Jógvansdóttir 1, Inga Danberg 1

**Brotskøst:**
VB: 5, Neistin 3

**Útvísingar:**
VB 3, Neistin 3

**Dómarar úr Kyndil:**
Hanus Kúrberg og Hans Thomassen



*Í fyrra hálvleiki var líkt til, at ein sjey mála sigur ikki var heilt ógjørligur fyri Stjørnuna. Serliga Andrian og Vesna gjørdu nógv um seg hesa løtuna, men í seinna hálvleiki fekk kyndil tamarhald á støðuni*

***Mynd: SáH***

# Marita sløkti Stjørnuna

*Tá Stjørnan fór at trúgva upp á møguleikan at vinna stórsigur á Kyndil, tók Kyndils-málverjin um endan*

Stjørnan-Kyndil 25-28 (16-13)

Kyndil staðfesti sítt pláss í steypafinaluni, tá tær eisini vunnu seinnu hálvfinaluna móti Stjørnuni.

Dysturin, sum var spældur í fullsettari KÍ-høll sunnudagin, endaði við trý máls sigri til liðið úr Havn, og samanlagt gjørdist tað tí til ein tryggan Kyndla-sigur. Samanlagt vann Kyndil við 10 málum.

Heimaliðið gjørdi tó ein vørr í fyrra hálvleiki, og ein stóran part av tíðini var líkt til, at Stjørnan kundi klára at vinna aftur tey sjey málini, sum tær taptu við í fyrra dystinum í Havn.

Við hvørt vóru fimm mál á muni, og Stjørnukvinnurnar útstrálaðu sjálvsálit og vilja hesa løtuna. Nógvu heimaáskoðararnir vóru eisini við til at stuðla undir avrikið.

Jugoslavisku spælararnir hjá Stjørnuni stóðu seg væl hesa løtuna. Vesna á vinstra vongi og Andrijana á høgra brutu ofta ígjøgnum, og tá tær ikki fingu mál, fingu tær brotskast. Simona Hansen var allatíðina ein hóttan við sínum fram úr skoti, og tá kvika spælið hjá heimaliðnum rættiliga koyrdi, komu tær sum oftast ígjøgnum.

**Avgerðin**

Men rundan um hálvleikssteðgin fall avgerðin í dystinum. Seinastu fimm minuttirnar av fyrra hálvleiki, tá Stjørnukvinnurnar rættuliga vóru farnir at trúgva upp á møguleikan at vinna stórsigur, hevði málverjin hjá Kyndil nakrar frálíkar bjargingar.

Marita Hermansen bjargaði fleiri ferðir, tá Stjørnuspælarar vóru í fríari støðu, og við hesum bjargingum syrgdi hon fyrst og fremst fyri, at munurin millum liðini minkaði, og síðani at Stjørnuspælararnir mistu nakað av sjálvsálitinum.

Trý mál vóru á muni, tá spælararnir fóru til hálvleik, og tá Kyndlamálverjin helt fram við góða spælinum eftir steðgin, datt alt niðurfyri hjá heimaliðnum. Restina av tíðini var tað ein hálvhjartað roynd at vinna dystin, men so hvørt sum tíðin leið, styrkti Kyndil um sína støðu, og seinasta partin av dystinum var tað lætt at toga sigurin í land, tí tá hevði heimaliðið uppgivið dystin.

Stjørnan royndi at mansverja Lottu Sørensen fittan part av dystinum, men hetta eydnaðist ikki serliga væl. Hon skoraði sjey mál, og umframt hana hevur Kyndil aðrar spælarar, sum duga at gera mál.

**Ber ikki til at meta**

Dysturin stóð millum tvey av liðunum, sum stríðast um gullmerkini í landskappingini, men dysturin kann ikki brúkast sum ein meting av styrkini hjá teimum báðum liðunum í løtuni.

Tá Kyndil minkaði um munin í dystinum, fullu fleiri av Stjørnuspælarunum í fátt, og teir gjørdu nógv mistøk. Eftir hetta kundi Kyndil toga seg fram um og halda seg frammanfyri Stjørnuna restina av tíðini.

Stóra royndin hjá Kyndil og Stjørnuni verður, tá liðini nú hittast í landskappingini.

EK

**Dysturin í tølum**

**Málskjúttar:**
Stjørnan: Vesna Tomajek 7 (2), Simona Hansen 6 (2), Annika Ljósstein 4 (1), Andriana Milodanovic 4, Jastrid Gullaksen 2, Anna K. Samson 2
Kyndil: Lotte Sørensen 7 (4), Jórun Ludvig 6, Ann Hansen 4, Rakul N. Joensen 4, Palma Petersen 3, Frida Johannesen 2, Semona Fjallstein 1, Jensia Petersen 1

**Brotskøst:**
Stjørnan 7, Kyndil 5

**Útvísingar:**
Stjørnan 3, Kyndil 5

**Dómarar úr Tjaldur:**
Dánial Hansen og Kári Hansen



# Nýtt ættarlið bjóðar seg til

*Sunvard Joensen er 69. føroyski altjóða skrásetti føroyski landsliðsmaðurin*

Eitt nýtt ættarlið av landsliðsspælarum er smátt um smátt við at seta sín dám á hópin hjá Allani Simonsen.

Í dystinum ímóti Finnlandi í gjár fekk 21 ára gamli Sunvard Joensen fyri fyrstu ferð høvið at verja føroyska málið. Hann loysti Jens Martin Knudsen av eftir steðgin. GÍ málverjin er fimti landsliðsmálverjin í teimum 64 dystunum, og hann er av einum øðrum ættarliðið, enn teir, sum annars hava verið ímillum stólparnar. Teir hava verið Jens Martin Knudsen, Kaj Leo Johannesen, Jákup Mikkelsen og Bjarni Johansen.

Sunvard Joensen er einasti føroyski spælarin í Spania, sum ikki hevði roynt at spæla landsdyst frammanundan.

**Tað fruktar væl**

Fróði Benjaminsen og Heðin á Lakjuni, sum báðir høvdu spælt tveir landsdystir frammanundan, vóru í gjár fyri fyrstu ferð ímillum teir fyrstu ellivu.

Jákup á Borg spældi í gjár sín níggjunda landsdyst, og hetta var onnur ferðin, at hann var ímillum teir fyrstu ellivu. Fyrra ferðin var ímóti Andorra fyri einum lítlum ári síðani.

Sunvard, Fróði, Heðin og Jákup eru saman við Rógva Jacobsen, sum seinnapartin av 2. hálvleiki loysti Jákup á Borg av, føddir í 1977, 1978 og 1979. Tað vil við øðrum orðum siga, at teir eru komnir fyri seg í vaksnamannafótbólti, eftir at Allan Simonsen í 1994 gjørdist venjari hjá landsliðnum.

Hesir fimm ungu menninir hava allir roynt seg á U–16 og U–18 landsliðunum, og tað boðar frá, at arbeiðið við unglingalandsliðunum, sum er styrkt nógv tey seinnu árini, hevur borið frukt.

JH

# Veteranar ganga aftur

*Todi er rárur á beinkinum, og Óli Johannesen noyddist fyri triðju ferð at sita uttanfyri, tí hann var skaddur*

Tað var ein fremmand støða fyri føroyska toppskjúttan, Toda Jónsson, tá hann í gjár sat á beinkinum í 1. hálvleiki. Todi, sum ikki kundi spæla í gjár, tí hann hevði trupulleikar í rygginum, hevur verið á landsliðnum síðani 15. juli í 1991, og hann hevur bara eina ferð áður ikki verið ímillum teir fyrstu ellivu. Tað var í 7–0 tapinum í Rumenia 8. mai 1992, tá hann síðsta hálva tíman spældi fyri Jan Dam.

Tá olympiska landsliðið hjá Finnlandi og Føroyar 27. februar í 1991 spældu 2–2 í óalmennum landsdysti í Portugal, var Todi á beinkinum alla tíðina.

Óli Johannesen noyddist at geva avboð í gjár, tí hann hevði bruna í einari tá. At Óli er burtur frá er bara komið fyri tvær ferðir áður – í Estlandi í1998, tá hann var til próvtøku, og í San Marino í 1995, tá hann var skaddur.

**Veteranar við aftur**

Tveir spælarar, sum til saman hava spælt 74 landsdystir, og sum tey bæði seinastu árini meiri ella minni hava verið roknaðir sum fyrrverandi landsliðsspælarar, vóru í gjár aftur ímillum teir fyrstu ellivu. Hetta var fyrsta ferðin, at Jan Dam og Kurt Mørkøre hava verið á landsliðnum saman síðani 27. februar 1996.

Jan Dam hevur ikki verið á landsliðnum síðani hósdagin 4. juni 1998. Í 5–0 tapinum í Estlandi var Jan Dam liðformaður og aftasti maður.

Síðani tá hevur landsliðið spælt ellivu dystir, og Jan Dam hevur sitið á beinkinum fimm ferðir uttan at koma á vøllin. Seks ferðir hevur hann ikki verið í hópinum, og onkra ferðina hevur tað verið, tí hann hevur verið skaddur.

Í fjør kundu avgerðirnar hjá Allani Simonsen bent á, at venjarin ikki roknaði við veteraninum. Jan Dam slapp ikki á vøllin í landsdystinum, sum 3. mars varð spældur í Spania ímóti Andorra, og Jan Dam var ikki í hópinum, tá landsliðið í heyst spældi fýra ferðir.

Í gjár var 31 ára gamli veteranurin, sum hevur spælt 37 landsdystir og hevur skorað eitt mál, við aftur.

**Kurt burtur í fýra ár**

Kurt Mørkøre, sum 20. í hesum mánaðinum verður 31 ár, spældi í gjár fyri 27. ferð á landsliðnum. Síðsti dysturin var í venjingarleguni í Kýpros 27. februar í 1996. Ta ferðina vann Aserbadjan 3–0.

Áhugavert er at staðfesta, at Kurt Mørkøre, sum higartil hevur skorað eitt mál á landsliðnum, hesa ferð var í álopinum. Tá Føroyar í 1988 spældu fyrsta altjóða skrásetta landsdystin í Íslandi, var Kurt Mørkøre aftasti maður. Síðani var hann fremsti álopsmaður og miðvallari sjey ferðir. Men frá dystinum í Gundadali ímóti Turkalandi 15. juli 1991 og í hinum dystunum, sum Páll Guðlaugsson hevði ábyrgdina, var Kurt í verjuni.

Tá Allan Simonsen tók við í 1994, var Kurt Mørkøre í tvey ár miðvallari flestu ferðirnar. Í 1996 ætlaði venjarin, at Kurt skuldi gerast aftasti maður. Núverandi Sogndal maðurin røkti hesa uppgávuna í tveimum dystum, men so gavst hann. Nú er hann aftur á landsliðnum, og í gjár var hann aftur í álopinum fyrsta tíman.

JH

# Halda skil á

Noreg og Ísland spældu málleysan javnleik í Spania í gjár. Jón Kári Frederiksen úr Klaksvík var annar linjuverjin.

Mikudagin skulu Finnland og Ísland spæla ímóti hvørjum øðrum, og tá verður Lassin Isaksen dómari.

Føroyingar spæla aftur í Spania fríggjadagin. Tá verður Ísland mótstøðuliðið.

JH

# Tepur ósigur í linligum dysti

*Í ársins fyrsta landsdysti máttu føroyingar taka til takkar við einum teprum ósigri, tá A-landslið okkara leikti móti finska landsliðnum. Talan var tó ikki um sterkastu manning hjá báðum liðunum, og m.a. varð Todi Jónsson noyddur at sita uttan fyri allar 90 minuttirnar*

JÁKUP MØRK

Í fagrasta veðrið fóru føroysku landsliðsleikararnir á vøllin í La Manga í Spania. Flestum kunnugt stóð fyrsti landsdysturin á árinum á skránni.

Dysturin móti Finnlandi er samstundis fyrsti dysturin hjá føroysku leikarunum í nýstovnaðu norðurlendsku kappingini.

Framman undan var greitt, at hóast talan var um eina millumlanda kapping, so vóru langt í frá øll londini, sum tóku uppgávuna í líka stórum álvara.

Flestu londini gjørdu framman undan av, at stóru stjørnurnar, sum leika við ymsum útlendskum feløgum, ikki skuldu vera við á hesum túri, og tískil sluppu føroyingar undan at hitta m.a. Jari Litmanen og Sami Hyppia, sum leika við somikið kendum feløgum sum Barcelona og Liverpool.

**Uttan Toda**

Føroyska liðið, sum í gjár fór á vøllin var mannað við hesum leikarum: Jens Martin Knudsen, Henning Jarnskor, Johannus Joensen, Jan Dam, Jens Kristian Hansen (liðf.), Heðin á Lakjuni, Sámal Joensen, Fróði Benjaminsen, Julian Johnsson, Jákup á Borg og Kurt Mørkøre .

Tað, sum serliga var merkisvert við hesi byrjunaruppstilling, var at somikið sterkir leikarar sum Allan Mørkøre og Uni Arge sótu á beinkinum. Eisini sótu Todi Jónsson og Óli Johannesen uttanfyri, men hetta komst av, at báðir høvdu skaða, og tískil ikki vóru førir fyri at spæla

Sum tað skiltist á útvarpsmanninum úr Spania, byrjaði dysturin heldur varisliga. Stórar møguleikar var ikki talan um, tó at finnar ta einu ferðina vóru í so naskir, men bólturin endaði við síðuna av málinum.

Serliga frá føroyskari síðu var byrjanin varlig, og líkt var kanska eisini til, at hetta var í tráð við spæliætlanina hjá føroyska liðnum. Sostatt skuldu ganga einir 35 minuttir, áðrenn føroyingar høvdu fyrstu royndina á finska málið, tá Fróði Benjaminsen royndi seg við einum skotið, sum tó ikki órógvaði finska málverjan nakað serligt.

Tað var nú heldur ikki væntandi, at føroyingar skuldu verða spælstýrandi í hesum dysti.

Hjá flestu leikarunum er tað soleiðis, at dystarvenjingin seinastu tíðina hevur verið lítil og eingin.

Sjálvsagt hava teir vant nakað sjálvir, men hetta hevur fyri tað mesta verið renning, og hóast tað sjálvandi bøtir um spælið, at menninir orka at renna, kann hetta als ikki sammetast við venjingarstøðuna, sum leikararnir eru í, tá dystir verða leiktir hvørt vikuskifti.

Sama var sjálvsagt galdandi fyri flestu av finsku leikarunum, men kortini mundu føroyingar vera betri nøgdir, tá farið varð til hálvleiks, og tað framvegis stóð á jøvnum.

**Stongin var fyri**

Flestu høvdu helst væntað, at venjarin gór at gera fleiri útskiftingar í hálvleikinum, og so var eisini.

Útskiftingarnar vóru tó kanska ikki júst tær, sum føroyingarnir her heima, tí framhaldandi var Todi Jónsson hildin á beinkinum. Allan Mørkøre kom tó vøllin fyri Johannus Joensen, eins og Sunnvard Joensen kom inn fyri lærumeistaran, Jens Martin Knudsen.

Føroyska spælið broyttist tó ikki tað stóra av hesum, men brádliga var tað um reppið, at okkara menn tóku leiðlsluna.

Tá níggju minuttir vóru leiktir, fingu føroyingar innkast á finsku hálvuni.

Bólturin varð longdur inn í finska brotsteigin, og við eini knappari vending fekk Jákup á Borg skot á bóltin, men tíverri brast skotið á stongina og út aftur í spælið.

Nú veit eg ikki, um føroyingar gjørdust ov djarvir í framrættaða spælinum, men í øllum førum gekk galið fáar minuttir eftir vandamiklu føroysku royndina.

Hetta hendi tá finnlendingar fingu møguleikan at spæla seg ígjøgnum í vinstru síðu, og tá bólturin varð beindur inn í føroyska brotsteigin, var Anti Sumiala á rætta staðnum, og sendi hann bóltin dygst úti við stongina uttan møguleika hjá Sunnvardi at verja fyri.

**Skifti meira**

Tá á leið ein tími var leiktur av dystinum, framdi Allan Simonsen aftur tvær útskiftingar, og var tað hesu ferð Uni Arge og Øssur Hansen, sum komu á vøllin fyri ávíkavist Kurt Mørkøre og Heðin á Lakjuni.

Løtu seinni varð Rógvi Jacobsen sendir á vøllin fyri Jákup á Borg.

Einki er at siga til, at nógvar útskiftingar verða framdar í slíkum dysti.

Dystirnir eru jú fyrst og fremst ætlaðir til venjingar, og tískil er sjálvsagt, at fleiri leikarar skulu hava møguleika í slíkum dysti.

Tó er tað ofta soleiðis at hesar útskiftingar órógva spælið hjá liðunum rættuliga nógv, við tað at rútman í spælinum verður brotin.

**Reytt kort!**

Tá eitt korter var eftir at spæla av dystinum, stakk ein hending seg upp, sum brádliga betraði um fortreytirnar hjá føroyingunum fyri at fáa nakað burtur úr dystinum.

Rógvi Jacobsen var á veg fram eftir vøllinum, tá ein mótstøðumaður tók beinini undan honum. Dómarin var eirindaleysur, og finski leikarin mátti tungu leiðina av vøllinum.

Føroyingar megnaðu tó ongantíð at gera sær dælt av yvirtalsstøðuni, og heldur vórðu tað mótstøðumenninir, sum høvdu vandamestu atsóknirnar eftir útvísingina.

Saman um tikið kunnu føroyingar tó allar helst vera hampuliga væl nøgdir við dystin.

Fleiri av minni royndu leikarunum fingu møguleikan í dystinum, og hetta kann koma liðnum til góðar seinni.

Har umframt gevur hetta eisini landsliðsvenjaranum ein kærkomnan møguleiki at síggja, hvussu ungu leikararnir standa seg, tá talan er um altjóða landsdyst, og í so máta er tað kanska eingin katastrofa, at Todi mátti binda frið henda dystn.

Hann man nevnliga langt síðani hava prógvað, hvønn týdning hann hevur fyri landslið okkara.